

*Forkunnug framsýning einamest við grafikki hjá Edvard Munch var í Listasavni Føroya í 2005*
*Mynd: Jens K. Vang*




*Unga Herdis Jakobsen vil vera listakvinna. Myndin: Moonlight 2003*

tjóðarsavn. Men hvat meira skal so til fyri at fáa hetta at henda? Í grein í Dimmalætting 22.mars tosar Jógvan á Lakjuni um at endurskoða viðtøkurnar fyri savnið saman við nýggja stýrinum við atliti til møguligar bygnaðarbroytingar á savninum. Er hetta gjørt? Vit bíða eftir einí frágreiðing.

## Fasta framsýningin vorðin vánaligari

Tó at listasavnið er ein sjálvsognarstovnur, hevur savnið tær skyldir, sum eitt tjóðarlistasavn hevur og sum millum annað fevnir um at keypa og sýna fram tað besta innan føroyska samtíðarlist. Hesum knípur tað við í løtuni. T.d. varð einki keypt til savnið á ársins bestu føroysku felagsframsýning; Heystframsýningini. Eyðvitað verður skráin í einum listasavni vanliga løgd fleiri ár fram, tó at pláss onkuntíð verður fyri spontanum hugskotum, tá avlýsingar o.a. eru. Hetta er eisini galdandi fyri eitt nú forkunnugu framsýningina við Edvard Munch, ið longu var á tekniborðinum, tá Bárður Jákupsson var leiðari í Listaskálanum. Hinvegin eru broytingarnar, sum nú eru hendar við teirri føstu framsýningini eftir øllum at døma framdar av nýggju leiðsluni. Hugskotið at seta verk hjá ungum listafólkum saman við eldri klassikarum er góður og heppið nýtt t.d. í Statens Museum for Kunst í Keypmannahavn í framsýningini Clinch. Sama er ikki galdandi fyri framsýningina í Listaskálanum. Fyri tað fyrsta eru góðskukrøvini als ikki nóg høg; vánalig myndlist gerst ikki betri av at verða hongd við síðuna av góðari myndlist. Tað einasta, sum hendir er, at framsýningin sum heild gerst vánaligari eins og tað er hent við føstu framsýningini í Listaskálanum. At vera góður sniðgevi, scenografur, arkitektur osfr. er ikki einsbetýðandi við at vera dygdargott myndlistafólk. Hetta er sjálvsagdur lutur fyri tey flestu, men ikki í Listasavni Føroya, har tey av álvara eru farin at fjasast við brúkslistini. Hetta er saman við ógrundaðum pástandum sum t.d. “Tekstillistin er nakað serligt fyri Føroyar” í óprofessionella tíðindaskrivinum dagfest 14.nov, rópandi dømi um, at Listasavn Føroya í hættisligan mun vantar ein listfrøðing.

## Listasavn á Sandi

Sofus Olsen hevur í greinum víst stóra og holla vitan um føroyska list, sum hann hevur stuðlað og savnað í mong ár. Hann er eisini av álvara ónøgdur við leiðsluna í Listasavni Føroya og hvør veit um tað var henda ónøgd, sum av álvara fekk ferð á ætlanir hansara um at byggja eitt listasavn í føðibygd sínari á Sandi. Í øllum førum stendur savnið longu har og myndirnar, vit sóu í SvF innan úr savninum boða frá góðum. Hetta frálíka privata initiativið átti at verið til íblástur hjá tí almenna. Vit kundu havt eitt Steffan Danielsen savn í Nólsoy, eitt Ruth Smith savn í Vági osfr. og hervið verið uppá forkant við ta sonevndu mentanarturismuna, ið er alsamt vaksandi orsakað av tí vaksandi bólkinum av eldri, men vælhildnum, mentaðum og múgvandi vesturlendingunum, ið tráa eftir autenciteti og mentanarligum upplivingum. Men tað er sjálvandi ivasamt hvørt vit hava ráð til slík lokal listasøvn nú tað ljóðar sum vit ikki longur hava ráð til okkara bókasøvn.

## Heystframsýningin

At einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt, var stórfingna Heystframsýningin kanska tað greiðasta dømi um í 2005. 12 av okkara bestu listafólkum tóku seg úr myndlistafelagnum, sum tey av ymsum orsøkum vóru ónøgd við. Útbrótararnir, sum tey verða nevnd millum manna, eru hvørki kend sum serligar provotýpir ella klandursvætti. Heldur er talan um hóvlig, væletablerað og seriøs listafólk, sum hava tikið dik á seg til stóra eydnu fyri føroysku myndlistina. Út yvir tær serligu hølisumstøðurnar, var Heystframsýningin ikki skelkandi moderna, men hon var góð. Hvørt tey 12 ella fleiri gera eitt felag ella hvussu og

*Framhald á næstu síðu*



*Útbrótararnir sýndu fram í hølum hjá Tórshavnar Skipasmiðju*
*Mynd: Jan Müller*